VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Upp í hvassan vind av landsynningi og út á dagin upp í skrið, móti kvøldið av suðri. Skýggjað og út á dagin regn. Hitin millum 5 og 9 stig.



Veðrið hósdagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og landsynningi. Skýggjað og regn av og á. Hitin millum 5 og 9 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og útsynningi, út á dagin nakað minkandi. Skýggjað og regn ella ælaveður. Hitin millum 3 og 7 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
At byrja við gul til stívt andøvsgul av suðri, seinni eystan ella landnyrðingur, vaksandi upp hvassan vind. Skýggjað og regn í skiftum. Hitin millum 3 og 7 stig.

Hækkandi sól

STYTSTI DAGUR
Justinus Leivsson Eidesgaard
justinus@post.olivant.fo

Einans tvey hús verða bakaði av sólini styttsta dag í Oyndarfirði
Mynd: Justinus Leivsson Eidesgaard

Fyri nógv fólk í Føroyum hevur tað stóran sálarligan týdning, at sólin styttsta dag steðgar á síni ferð suðureftir, skimast eitt sindur kring seg har suðuri, og er á veg norður aftur longu jólaaftan. Hetta eru fólk, hvørs gerandisdagur verður ávirkaður av, hvussu ljóst er uttanfyri. Onnur blíva í ørviti av ov nógvum ljósi, og so eru tað tey, har einki bítur á.

Hendan myndin er tikin av Hellunum heim til Oyndarfjarðar styttsta dag, og hon sigur alt sum oyndfirðingar vita at siga um sólina hesa tíðina av árinum og kanska eitt sindur meira. Og tað sum myndin sigur meira, er allarhelst gerandisvitan úti á Hellum, tí hellumenn síggja við egnum eygum, tað sum oyndfirðingar mugu gita sær til, blendaðir av sólin undan Jarðadalstindi hesa tíðina av árinum, Er lítil sól í Oyndarfirði um jóltíðir, so er enn minni á Hellunum. Havnafólk vita slett ikki hvat ein myrkur vetur er, tey hava sólina alt árið, hesa tíðina frá tí hon rísur í ein landsynning, og til hon aftur setur í ein útsynning.

Og skulu vit plága lesaran við reinari lokalvitan út Oyndarfirði hendan hendan týsdag tann seinasta í árinum. Jú tað gera vit, tí sólin er upprunin til alt lív og trivnað og hóast hon vísir seg aðrastaðir í landinum í hesum døgum, á øðrum støðum og á annan hátt, so er hon sólin og nú lækkar hon ikki meira, hon ger seg til at koma norður aftur og hita okkum um nakrar mánaðar.

Myndin sýnir at hesa tíðina á middegi, tá sólin stendur hægst á himmalinum, eru tað bara tvey hús í Oyndarfirði har sólin skínur á. Annað er mítt barnaheim á Marknagili og hitt er aldargamli býlingurin longur frammi í Garðshorni. Í dag er bara eittans húsið eftir, fyrr vóru fýra. Sólin kundi skína hvønn dag í árinum í mínum barnaheimi á Marknagili og vit sum eru ættaði hagani skuldu sostatt verið ljósins børn, um vit eru tað og øll somul, er nú ein onnur søga.

Sólin sleppur ikki longur oman til rættina niðan fyri Tøvuna og omanfyri niðanfyri Mylluna ella frammi í Geil. Hon er sum ein kíli úr rættini og niðan í fjall. Skýggin vinstru megin er Knúkur. Mitt í skugganum sær hann út sum ein ógvuliga høgur hamari ella eitt berg, men her er tað ljósið sum spælir okkum eitt puss, tí ongin so høgur hamari er í Knúki. Tað er frástøðan sum veksur upp, eins og undir einum sjóneyka. Skuggin høgrumegin syðra síða á Helvtini, tað sum gøtumenn kalla fyri Norðan.

Sum dagarnir líða kemur skuggin longur oman í bygdina og longu nýggjársdag sær sólin aftur á kirkjutornið í Oyndarfirði. Tá er tann myrka tíðin av í Oyndarfirði. Sólin er bert burtur úr gomlu bygdini í fjúrtan dagar. Tað er lítið móti myrkrinum í Tjørnuvík. Leirvík og aðrastaðir í landinum.

Nú ljóðar tað sum oyndfirðingar síggja sólina hvønn dag, tað er so langt burtur frá. Men styttsta dag vísti Várharra, at hann ikki heilt hevði gloymt oyndfirðingar, hann lat sólina skína á høgan og lágan sum væl at merkja helt seg uppi í ljósanna hæddum á Marknagili og frammi í Garðshorni. Restin av bygdini lá í skugga . Og síðan styttsta dag hevur mest verið landnyrðingur, har hann hevur ligið illsligur við kava og vátakava, sum hann hevur slett úr sær undan Stongini. Men sólin hækkar og í ovurmorgin skínur hon aftur á kirkjutornið, meðan fólk sita í kirkju fyrsta dag í árinum. Men tá skal eisini verða klárt ta løtuna um Gud vil.

Kring stytsta dag er sólin bara frammi góðar tveir tímar í Oyndarfirði klárar dagar. So hvørvur hon, fyrst niðan í fjall og síðan burtur aftur.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷8
Nuuk	÷8
Qaqortoq	÷6
Ammassalik	–
Saint John's	÷1
Halifax	÷2
Reykjavík	0
Seyðisfjørður	3
Tórshavn	5
Lerwick	6
Aberdeen	6
London	8
Tromsø	÷9
Bergen	1
Oslo	–
Stokkhólm	÷3
Keypmannah.	0
Helsinki	÷7
Moskva	÷13
Berlin	÷5
Warzawa	÷9
Kiev	÷12
Bukarest	÷6
Paris	2
Madrid	7
Róm	7
Malorca	13
Athen	8
Malta	11
Tunis	12
Beijing	8
New Dehli	8
Bangkok	33
Jakarta	31
Sydney	–
New York	3
Miami	24
Los Angeles	14
Meksikobýur	–
Panama	32
La Paz	–
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	31

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst í ein landnyrðing úr Føroyum fer í ein landnyrðing og eitt lágtrýst í ein útnyrðing úr Skotlandi fer eystureftir. Ein veikur hátrýstryggur fer fram við Føroyum í nátt vestaneftir.



Mikudagin fer eitt umfatandi lágtrýst móti havinum í ein útsynning úr Íslandi og liggur síðani stilt og sendir brúgvaløg inn yvir Føroyar. Seinni fer tað eystureftir beint sunnan fyri Føroyar.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 05/01 kl. 06⁰⁰– 06/01 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,3°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° - Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

AVFALLIÐ



Avfallið: 3,7 mm – mált frá 05/01 kl. 06⁰⁰–06/01 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í januar: 17,5 mm

VESTFALLSKYRRINDI

3. januar: Mánin longst frá jørðini
4. januar: Jørðin næst sólini
7. januar: Fullmáni

Kelda: Almanakkin 2004

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
7. jan	06.22	18.46	05.22	17.46	05.37	18.01	08.22	20.46	09.22	21.46	04.37	17.01	03.37	16.01	06.37	19.01	07.37	20.01	06.07	18.31	07.22	19.46
8. jan	07.11	19.35	06.11	18.35	06.26	18.50	09.11	21.35	10.11	22.35	05.26	17.50	04.26	16.50	07.26	19.50	08.26	20.50	06.56	19.20	08.11	20.35
9. jan	08.00	20.22	07.00	19.22	07.15	19.37	10.00	22.22	11.00	23.22	06.15	18.37	05.15	17.37	08.15	20.37	09.15	21.37	07.45	20.07	09.00	21.22
10. jan	08.44	21.05	07.44	20.05	07.59	20.20	10.44	23.05	11.44	—	06.59	19.20	05.59	18.20	08.59	21.20	09.59	22.20	08.29	20.50	09.44	22.05

5 707265 100036 >